Tveir farnir burtur úr MC Hár

Hvørki Allan Mortensen ella Brynjolfur á Heygum vera á pallinum, tá ið MC Hár fer at spæla til finaluna í Prix Føroyum. Nýggjur ljómborðsspælari er komin upp í bólkin

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Bara eina viku áðrenn Prix-finaluna eru tveir tónleikarar farnir úr MC Hár, og ein nýggjur ljómborðsspælari var um páskirnar boðsendur at koma á venjingarlegu í Hósvík, har bólkurin heldur til í hesum døgum.

Tað er rapparin Allan Mortensen og ljómborðsspælarin Byrnjolfur á Heygum, sum eru farnir úr MC Hár.a

– Tað er ikki av nakrari illstøðu, at teir báðir eru farnir úr bólkinum, og vit verða minst líka væl fyri til finaluna, sum vit vóru til innleiðandi umfarið, sigur Niels Uni Dam, rappari í MC Hár.

Brynjolfur a Heygum verður avloystur av einum royndum og dugnaligum ljómborðsspælara – Stamen Stanchev – meðan eingin kemur fyri rapparan Allan Mortensen.

– Eg, Allan og tveir sangarar afturat hava verið við í bólkinum seinastu tvey árini. Nú eru vit so triggir sangarar eftir, og tí halda vit ikki, at tað er nøkur orsøk at takan nakran afturat við í bólkin, sigur Niels Uni.

Lesa meira um MC Hár og hinar finalubólkarnar til Prixið í serblaðnum hjá Sosialinum, sum liggur inni í blaðnum í dag.

Stórur áhugi fyri stjørnunum

Ein av konsertunum við Stjørnum í eitt kvøld varð útseld beinanvegin, men møguleiki er at sleppa til tvær aðrar konsertir

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Vikuskiftið 10. og 11. mai koma tríggjar av stjørnunum, sum vóru við í sendingini hjá DR, Stjørna í eitt kvøld, til Føroya at syngja.

Tað eru Jacob Andersen, Martin Petersen og vinnarin av kappingni, okkara egna Guðrun Sólja Jacobsen, sum fara at syngja til konsertirnar.

Harafturat verður eisini ungi Brandur Enni gestur til tiltøkini, og hann fer at syngja nakrar av sínum sangum.

Guðrun Sólja Jacobsen fer at syngja saman við tveimum av kappingarneytunum til Stjørna í eitt kvøld, tá ið Stjørna í eitt kvøld-konsertir verða hildnar í Havn og Fuglafirði

Konsertirnar

Leygarkvøldið 10. mai verður konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og atgongumerkini til hesa konsert eru nú sett til sølu.

Sunnukvøldið 11. mai kl. 20.00 verður konsert í Norðurlandahúsinum í Havn, og atgongumerkini til hesa konsert vórðu seld eftir stuttari tíð.

Tí er ein eykakonsert løgd kl. 22.00 sama kvøld, og longu nú eru nógv atgongumerki seld til hesa konsert.

Danskir tónleikarar

Guðrun Sólja Jacobsen hevur havt úr at gera seinastu vikurnar. Hon hevur sungið nógvastaðni í Danmark, og hetta er fyrstu ferð, at hon verður aftur at hoyra í Føroyum, síðani vikuskifið, tá ið hon vann Stjørnu-kappingina.

Saman við teimum trimum sangarunum fer ein bólkur við donskum tónleikarum at spæla. Hetta eru tónleikarar, sum hava ferðast saman við stjørnunum í Danmark.

Greiðari býti millum land og kommunur

TÍÐINDASKRIV
frá Føroya Kommunufelag

Føroya landstýri hevur í fleiri ár mælt til at fáa eitt greiðari býti ímillum land og kommunur

Hóast hetta, uppliva kommurnurnar ferð eftir ferð at Føroya Løgting lóggevur soleiðis

- At eyka útreiðslur við lóg verða lagdar á kommunurnar, við tí fyri eyga at minka um útreiðslur landskassans.
- At hetta, verður gjørt uttan samráð við kommunurnar.
- At allar meginreglur um greitt uppgávu og ábyrgdarbýti verða brotnar.

Seinastu dømini eru uppskotið frá landsstýrismanninum í almannamálum viðvíkjandi broytingum í forsorgarlógini, og uppskotið frá figgjarmálaráðnum um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (FAS – skattur)

Vantandi barnaansing

Í 2002 vóru sambært forsorgarlógini útgoldnar góðar 7 mill kr. frá Almannastovuni vegna vantandi barnaansing.

Við tí grundgeving at spara á lógarbundnu útreiðslunum á almannaøkinum, er lógaruppskot lagt fram ið áleggur kommununum at endurrinda Almannastovuni hesar útreiðslur við afturvirkandi kraft frá 1 jan. 2003.

Føroya Kommunufelag vil gera vart við, at

- Útreiðslur vegna væntandi barnaansing er ein partur av forsorgarøkinum. Forsorgarøkið er ikki lagt út til kommununnar at umsita, og partar av hesum øki eiga ikki at verða lagdir út við tí grundgeving, at landskassin skal spara ímun til lógarbundnu útreiðslurnar á almannaøkinum.
- Útreiðslur verða lagdar á kommununnar aftaná at figgjarætlanin fyri 2003 er gjørd. Við øðrum orðum skulu kommununnar finna 7 mill kr. innan teir karmar sum longu samtykta figgjarætlanin hjá kommununum hevur.
- Við uppskotinum fáa kommununnar álagt útreiðslur, tær ikki hava ávirkan á. Avgerðarheimildin fer framvegis at liggja hjá Almannastovuni. Hetta er als ikki í tráð við meginregluna um, at figgjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum.

Skattur - FAS

Á sama hátt hevur Landsstýrismaðurin figgjarmálum lagt uppskot fyri Løgtingið sum við afturvirkandi kraft broytir býtið av FAS – afturbering ímillum land og kommunur.

Í viðmerkinginum til uppskotið verður sagt, at skattlættin ið latin var pensjónistum í 2002 kostaði kommuninum 5.5 mill kr. Breið politisk semja var tá um, at skattalættin ikki skuldi kosta kommununum nakað.

Sum kompensatión var broyting tískil gjørd í býtislutfallinum ímillum land og kommunur í samband við FAS – afturbering, soleiðis at kommununnar komu at gjalda 5.5 mill kr minni í FAS-afturbering.

Hetta skal sambært fyriliggjandi uppskotið broytast aftur, við tí úrslitið, at kommununnar í 2003 fáa ein eykaútreiðslu uppá 5.5 mill kr.

Men sanleikin um skattalættan til pensjónistar er, sum eisini verður nevnd í viðmerkinginum til uppskotið, at

- kommununnar fáa 19,7 mió. kr. minni inn í skatti, meðan landskassin fær 9,7 mió. kr. meira inn í skatti. (broytingar í ásetingarlógini, Løgtingsmál nr 52-2001).

Fyri at minka um hesar skeivleikar var býtislutfallið í FAS-afturberingin broytt. Soleiðis at kommununnar fingu (19.7 – 5.5) 14.2 mill kr. minni inn í skatti og Landið bert fekk (9.7 – 5.5) 4.2 mill kr meira inn í skatti.

Hetta verður við fyriliggjandi uppskotið broytt aftur, soleiðis at skattalættin til pensjónistar kemur at kosta kommununum 19.7 mill kr. og landið fær 9.7 mil kr. fleiri inn í skatti.

sí talvu

Sostatt hava hesi uppskotini økt útreiðslurnar hjá kommununum við 32.4 mill kr.

Føroya kommunufelag vil vísa á rundskriv frá Løgmálaráðnum sum millum annað sigur:

"Er ein uppgáva kommunal so skal kommunan figgja hana , men er hon ein landsuppgáva, so skal landið figgja hana . Hetta hevur so við sær at bara tey, ið taka avgerðir kunnu áleggja sær sjálvum figgjarligu ábyrgdina av avgerðinum."

" Mælt verður til at land og kommunur í felag ráðleggja og raðfesta, hvussu viðurskifti teirra millum verða skipað"

Føroya Kommunufelag vil við hesum heita á Føroya Løgting um, at nýta hesar meginreglur í sínum arbeiði.

	2002		2003	
	Land	Kommunur	Land	Kommunur
Vantandi barnaansing	- 7,2 mill	0	0	-7.2 mill
FAS - Skattur	- 5.5 mill	5.5 mill	5.5 mill	-5.5 mill
Skattalætti	9.7 mill	-19.7 mill	9.7 mill	- 19.7 mill
Tilsamans	**3.0 mill**	**-14.0 mill**	**15.2 mill**	**-32.4 mill**

Útkalling er ein kommunuppgáva

Tað eru kommununar sjálvar, sum skulu syrgja fyri at teirra sløkkilið hevur eina útkallingarskipan sum virkar nøktandi. At uppgávan við at útkalla sløkkilið kring landið í løtuni liggur hjá politinum í Havn er eingin sjálvfylgja. Tað staðfesta bæði Jón Klein Olsen, varaleiðari á politistøðini í Havn og Rógvi Johansen, samskipari av føroysku tilbúgvingini

TILBÚGVING
Rúnar Reistrup

Í Sosialinum hósdagin viðgekk ein heldur vónbrotin William Sand Davidsen, varaleiðari fyri sløkkiliðnum heima á Sandi, at hann hevði mist álitið á útkallingarskipanini hjá Alarmcentralinum, eftir at tað gekk illa at fáa boð út til sløkkiliðsmenninar heima á Sandi, tá eldur var í einum húsum leygarmorgunin fyri hálvari aðru viku síðan. Millum annað riggaði automatiska útkallingarskipanin á Alarmcentralinum ikki.

Ansa eftir við at kritisera

Jón Klein Olsen, varaleiðari á Politistøðini í Havn, viðgongur, at tað er sera óheppið, at automatiska útkallingarskipanin hjá Alarmcentralinum onkuntíð er svikalig, men vil vera við, at trupulleikin ikki er størri enn so, at tey vakthavandi á politistøðini í Havn kunnu ringja runt til allar sløkkiliðsmenninar. Og so leingi lokalu myndugleikarnir ikki koma fram við einari betri útkallingarskipan, mugu sløkkiliðini liva við teirri skipan, sum er nú.

- Eg haldi, at eldsløkkingarmyndugleikar kring landið skulu ansa eftir við at kritisera Alarmcentralin, tí í veruleikanum er tað ikki okkara uppgáva at sita og boða hvørjum einstøkum sløkkiliðsmanni frá, tá eldur er í. Vit kundu í prinsippinum gjørt av, at broytt mannagongd í morgin soleiðis, at tá vit fáa eina eldsfráboðan, ringja vit til borgarstjóran í tí kommununi har eldurin er, siga honum hvar eldur er í, og leggja hornið á. Men vit hava so valt at átikið okkum ábyrgdina fyri at boða øllum sløkkiliðnum frá, og hana reka vit so væl sum vit kunnu við verandi útgerð, sigur Jón Klein Olsen, varaleiðari á politistøðini í Havn.

Kommununar hava ábyrgdina

Løgtingslógin um eldsbruna er greið í sínum máli um hvør hevur ábyrgdina av, at útkallingarskipanin í sambandi við eldsbruna virkar sum hon skal. Í grein 12 í lógini stendur, at "Í hvørjari kommunu skal vera ein skipan til at boða sløkkiliðinum frá". Lógin ásetur eisini, at Føroya Tele skal vera til hjálpar, tá eldur skal fráboðast.

- Lógin sigur í roynd og veru, at hvør einstøk kommuna skal finna útav at fáa eina útkallingarskipan at virka. So um sløkkiliðið í einari kommunu ikki er nøgt við ta utkallingarskipan, sum vit nýta, so kann tað fara til kommunustýrið at biðja um eina aðra skipan. So skulu vit nokk brúka hana ístaðin, sigur Jón Klein Olsen.

Onnur skipan í Havn og Klaksvík

Útkallingarskipanin á Alarmcentralinum virkar um eina teldu. Tá Alarmcentralurin fær boð um, at brúk er fyri einum sløkkiliði, velur vakthavandi viðkomandi kommunu á telduskipanini, og setir skipanina í gongd við at ringja eitt ávíst tal av sløkkiliðsmonnum upp. Skipanin ringir til allar sløkkiliðsmenninar ísenn. Hvussu nógvar sløkkiliðsmenn skipanin ringir upp, og hvørjir teir eru, er avgjørt frammanundan av hvørjum einstøkum økissløkkiliði.

Økissløkkiliðini hava ábyrgdina av, at Alarmcentralinum altíð hevur dagførdar listar yvir sløkkiliðsmenn og telefonnummur teirra.

Øll økissløkkilið eru íbundin hesa skipan uttan sløkkiliðini í Havn og Klaksvík. Í Havn er altíð ein vakthavandi á brandstøðini, sum tekur sær av útkallingini. Alarmcentralurin kann tí geva hesum vakthavandi beinleiðis boð, og so klárar sløkkiliðið sjálvt restina av útkallingini.

Kommunan má gjalda

Í Klaksvík ræður sløkkiliðið yvir eini radioútkallingarskipan, har hvør sløkkiliðsmaður á vakt altíð hevur ein lítlan radiomóttakara uppi á sær - ein sonevndan bippara. Á Alarmcentralinum hava tey eitt útkallingartól, sum við einum knøtti kann seta allar bippararnar í Klaksvík ígongd. Hetta tólið er ogn hjá Klaksvíkar kommunu, men stendur á Alarmcentralinum, av tí at her verða øll neyðarkall um 112 telefonnummarið svarað.

- Um okkurt av hinum sløkkiliðnum vil hava eina betri útkallingarskipan, so er ein møguleiki at seta upp eina radioútkallingarskipan, og geva okkum her á Alarmcentralinum eitt útkallingartól. Men tað verður tann avvarðandi kommunan, sum noyðist at gjalda. Vit kunnu bara bjóða okkum til at passa hana, sigur Jón Klein Olsen.

- Eg haldi, at eldsløkkingarmyndugleikar kring landið skulu ansa eftir við at kritisera Alarmcentralin, tí í veruleikanum er tað ikki okkara uppgáva at sita og boða hvørjum einstøkum sløkkiliðsmanni frá, tá eldur er í, sigur Jón Klein Olsen, varaleiðari á politistøðini í Havn

Tilbúgvingarætlanin rørir ikki Alarmcentralin

Rógvi Johansen, tilbúgvingarsamskipari á Fiskimálaráðnum, arbeiðir í løtuni við at leggja síðstu hond á frágreiðingina um "Tilbúgvingarætlan Føroya", ið skal leggja alla tilbúgving í Føroyum í fastar karmar. Frágreiðingin er ikki almannakunngjørd enn, men kemur ætlandi fyri Tingið seinni í ár.

Hóast hann ásannar, at útkallingarskipanin hjá Alarmcentralinum kundi virkað betur, so sigur Rógvi Johansen ongar kollveltandi broytingar av Alarmcentralinum vera í komandi tilbúgvingarætlanini.

Í tilbúgvingarætlanini stendur ikki annað um Alarmcentralin, enn at hann skal dagførast tøkniliga, upplýsir Rógvi Johansen.

Spurdur hvat ítøkiligt liggur í orðunum um at dagføra Alarmcentralin tøkniliga, sigur Rógvi Johansen, at tey hava skeitt eitt sindur til Íslands, har útkallingarskipanin hjá Alarmcentralinum tykist at rigga betur.

- Tað sær út til at íslendingar hava funnið eina skipan, sum líkist okkara, men sum byggir á øðrvísi tøkni. Og tað tykist sum at tað ikki eru somu trupulleikar við útkallingini har, sigur hann.

Ringt at blanda seg

Men orsøkin til at "Tilbúgvingarætlan Føroya" ikki nertir stórvegis við Alarmcentralin er ikki at núverandi skipan er besta loysnin fyri framtíðina. Orsøkin er heldur, at brandtilbúgving er eitt kommunumál, og landsstýrið kann ikki blandað seg beinleiðis í, hvussu hvør kommuna skipar sína brandtilbúgving.

- Sum er hevur politiið í Havn átikið sær at vera vertur fyri eini skipan, sum teir ikki meta seg eiga. Og tí kunnu vit heldur ikki so væl krevja at politiið ger stórar íløgur í eina nýggja skipan, sigur Rógvi Johansen.

Alarmcentralurin verður umskipaður

Men hóast komandi tilbúgvingarætlanin ikki stingur tað út í kortið, so væntar Rógvi Johansen at tað kortini fer at henda ein kollveltandi broyting við Alarmcentralinum komandi árini.

- Mín egna fakliga meting av støðuni er, at krøvini frá samfelagnum til Alarmcentralin fara at vaksa til eitt støði, har politiið má taka støðu til annaðhvørt at broyta og útbyggja Alarmcentralin munandi ella at siga hann frá sær. Tí í framtíðini skal ein vælvirkandi Alarmcentralur kunna taka ímóti alarmum av øllum slag. Hann skal savna allar alarskipanir og vera knútapunkt fyri allari tilbúgving, og tað hevur politiið higartil ikki verið sinnað til at brúkt sín Alarmcentral til, sigur Rógvi Johansen, samskipari av føroysku tilbúgvingini, og leggur afturat, at ein nýggj skipan helst verður bygd á eitt samstarv millum lands- og kommunumyndugleikar, bæði viðvíkjandi kostnaði og tólbúnaði.

Tónleikur í Hoydølum

Í kvøld klokkan 20 fara næmingarnir í studentaskúlanum í Hoydølum á pall við øllum frá kórsangi til rocktónleik

TÓNLEIKUR
Rúnar Reistrup

Í kvøld, hóskvøld, skipa tónleikanæmingar í studentaskúlanum í Hoydølum fyri kvøldsetu, har høvi verður at hoyra og síggja nakað av tí, sum rørir seg av tónleiki millum næmingarnar í skúlanum.

Næmingakórið fer at syngja, og bólkar og einstaklingar fara at framføra egnan og læntan tónleik. Onkrir av bólkunum hava verið frammi í eitt nú Prix Føroyum.

Eisini luttaka næmingar úr Studentaskúlanum á Kambsdali.

Meðan tónleikararnir fylla tónar út í rúmið, hava áhoyrararir møguleika fyri at keypa sær ein kaffimunn og okkurt afturvið, siga næmingarnir í Hoydølum.

Tað eru næmingar við lærugreinini tónleiki á øðrum árið, ið skipa fyri tiltakinum.

Kvøldsetan, sum verður í samkomuhøll skúlans, byrjar kl. 20.00 og endar umleið kl. 23.00. Atgongumerki til kvøldsetuna kosta 30 krónur.